MENTAMÁLARÁÐIÐ

INNANHÝSIS

# Mentanarvirðisløn landsins 2023

verður latin Teiti Lassen, tónlistamanni

Teitur Lassen er fjølgávaður tónlistamaður, tónasmiður, yrkjari, tónleikari, sangari og framleiðari.

Tónlistagávurnar vóru eyðsýndar longu í tannáringaaldri.

Heimliga gjøgnumbrotið á tónleikapallinum kom í 1996 við nýskapandi bólkinum og útgávuni *Mark no Limits*, sum hevði sína serstøku og seinni so eyðkendu ljóðmynd.

Sum singer/songwriter hevur Teitur havt hugbindandi og nærverandi konsertir kring heimin í meir enn 20 ár.

Stóra altjóða gjøgnumbrotið kom við útgávuni *Poetry & Aeroplanes* í 2003, sum framvegis stendur sum ein tónlistaligur varði.

Millum aðrar týðandi útgávur eru *Káta Hornið* frá 2007, har Teitur yrkir og syngur á føroyskum, *Let the Dog Drive Home* frá 2010 og *I Want to be Kind* frá 2018.

Hóast ljóðmyndin framvegis er hin eyðkenda, er Teitur alsamt leitandi og kannandi á síni leið gjøgnum tónleikin.

Teitur er ein lýsandi stjørna á føroyska tónleikapallinum.

Fyri listaligu avrik síni fær Teitur Lassen
Mentanarvirðisløn landsins 2023.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna
18. oktober 2023

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo